Bráðfeingisætlan: Støð í Fugloy                                    Fugloy 10.10.2005

I farnu øld broyttist nógv í samfelagnum. Tað, ið vit nevndu framburð, drenaði kortini smáplássini fyri fólk:

1) Skipaflotin fór við monnunum
2) Skúlaverkið fór við ungdóminum
3) Eldrarøktin fór við teimum gomlu

Nú ið meginøkið ikki tykist megna at fáa til vega nóg mikið av ansingarplássum til tey gomlu (í løtuni bíða 150 eftir plássi), ætlar Fugloyar Kommuna saman við Utoyggjafelagnum at fáa ein arkitekt at gera skitsuætlan til eina støð, ið skal kunna nýtast til fleiri endamál:

1) Ellis-og røktarheim til 8-10 fólk
2) Vøggustovu og barnagarð til 8-10 børn
3) Matarhøll (bæði til búfólk og ferðafólk)

Skitsuætlanin kostar kr. 60.000,-
Av hesum rindar Fugloyar Kommuna kr. 20.000,- og Útoyggjafelagið kr. 40.000,-

Tá ið skitsan er liðug, sær Utoyggjafelagið til, at hon verður send teimum avvarðandi ráðunum í landsfyrisitingini (Heilsu-, Innlendis-, Vinnumála- o.s.fr.)

Verður tikið væl ímóti ætlanini, so hon verður framd í verki, fáa vit at síggja, hvat ið hon kann fara at hava við sær av trivnaði. Eydnast hon væl, er sjálvsagt at fara til aðrar útoyggjar við henni og royna hana har.

Fugloyar Kommuna

Utoyggjafelagið

áKirkju 22.01.2006

Til: Almanna-og Heilsumálaráðið
Att. Kristjan Árnason
Eirargarði 2
100 Tórshavn

Viðvíkjandi: studningsláni til eldrasambýli

Við hesum søkir Fugloyar Kommuna um studningslán til ætlanina, ið verður lýst niðanfyri.

í løtuni rindar Fugloyar Kommuna fyri trý ellis-og røktarpláss inni í Klaksvík. Millum starvsfólkini, sum eru um hesar tríggjar fugloyingar, eru fugloyarkonur í góðum aldri, sum búgva í Klaksvík, tí tær hava fast starv og tískil fasta løn har.

Nú er kommunan komin til tað, at hon ætlar at fara undir at byggja ein depil, sum av náttúrligum orsøkum verður eitt sindur óvanligur, av tí at hann ætlandi skal samskipa fleiri verk: eldrarøkt, barnaansing, ferðavinnu og skeiðsvirksemi. Eldrarøktin skal kunna hýsa upp í 6-8 gomul.

Leyslig kostnaðarmeting: kr.10 milliónir
Av hesum er deildin til eldrarøkt mett til um leið kr. 6 milliónir.

Tørvskanning: Eini 10 fólk í Fugloy eru um 60 og 70 ára gomul. Aðrastaðni í Føroyum búgva nógvir fygloyingar, sum hugsandi høvdu viljað sloppið á ellis-og røktarheim úti í Fugloy, um tað stóð teimum í boði. Um neyðugt, ber væl til at kanna tað nærri og skjalprógva tað.

Nú móti vári fer arkitektur at gera eina skitsuætlan av oyggjardeplinum, sum Almanna-og Heilsumálaráðið skal fáa eitt eintak av - helst í juni.

Eingin ivi er um, at ein sovorðin oyggjardepil kundi skapt nýggjar nútíðartilverumøguleikar hjá teimum ungu at búð fast úti í Fugloy. Samstundis kundi depilin lætt nakað um tørvin á røktarheimsplássum inni í Klaksvík.

Hetta er ein roynd hjá einari útoyggjakommunu at ganga nýggjar leiðir.

Vinaligar heilsanir,

vegna Fugloyar Kommunu

| | | |
|---|---|---|
| Zakarias Zakariassen | Jóannes Christiansen | Amalia í Frammistovu |
| Bygdarráðsformaður | Varaformaður | Kommunustýrislimur |
| 767 Hattarvík | 766 Kirkja | 766 Kirkja |

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Marianna Debes Dahl
767 Hattarvik

10. apríl 2006
Mál: 1700-026/06-2
Tygara skriv:
Viðgjørt: HIH

**Viðvíkjandi umsókn um stuðul til "Matg-hús"**

Tann 1. februar 2006 hevur Innlendismálaráðið fingið umsókn tykkara um stuðul í sambandi við verkætlan um "Marg-hús" í Fugloy.

Upphæddin, tit søkja um, er 40.000,- kr. Endamálið við verkætlanini er at byggja eitt hús í Fugloy sum skal húsa einum sambýli, barnagarði og frítíðantirksemi í oynni - eitt sokallað "Marg-hús". Stuðulin skal brúkast til at tekna og projektera hetta "Marg-hús.

Innlendismálaráðið hevur viðgjørt umsókn tykkara og niðurstøðan er, at vit meta verkætlanina at vera stak áhugaverda og kann eitt tílíkt "Marg-hús" gerast eitt stórt virði fyri Fugloynna, og hugskotið kann møguliga eisini endurnýtast á øðrum útoyggjum. Samlaða játtanin til útoyggjamenning hjá Innlendismálaráðnum er 270.000,- kr., og hava vit avgjørt at játta 40.000,- kr. til tykkara verkætlan.

Játtanin er treytað av, at stuðulin verður nýttur sambært umsóknini. Eisini er játtanin treytað av, at Innlendismálaráðið í seinasta lagi 1. juni 2006 fær eina frágreiðing um úrslitið av verkætlanini higartil, umframt at ein útgreinaður roknskapur skal fyrihggja.

Henda tilsøgn fær gildi, tá Innlendismálaráðið hevur móttikið váttan um, at tygum góðtaka hesa játtan og treytirnar. Hava vit ikki móttikið váttan tygara innan 10. mai 2006, fellur játtanin burtur.

I sambandi við váttan tykkara verða tit biðin um at upplýsa kontonummar at flyta stuðulin á.

Eru ivaspurningar, eru tygum vælkomin at ringja.

Vegna Innlendismálaráðið

HilmaV Høgenni
deildarstjóri

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

r

Fuj; ioyar Kommuna
v/ / akanas Zakanasen
76'' Hatlarvik

**Tórshavn, tann** 24. nin 2006

**J.Nr.:** 0.35-20060007>/2

**Viðgjert: RT/KA**

J

**Vhuíkjnndi umsókn um studoiagsi ín til bygging av røktarhcimi**

Fugioyar Kommuna hevur søkt um ;;tudningslár i sambandi við eina ætlan um at byggja eitt eld.i asambýli til 10 búfólk. Sambýlic: er ein paiuir av eini støm verkæthm um ein sonevndan oygjjadepil, íð ætlandi skal saraskipa eldrarøk , bamaansing, ferðavinnu og skeiðsvirksemi. Ein un tekning fyriliggur, og **í** umsóknim vero ir onki sagt um, hvussu ætlanin er at figgja verli.ærlamna: tiarumframt'**beT**~umsoknm bra av ivssu, hvat fíggmgmi av tarmrmmuparhrrom-**T** íløj? jjii viðvíkur.

A h;sum grundarlagi heldur landsstýrismaðurin tið kki vera ráðiligt at fara ínn í ema slika æiian og i hevur hann avgjørt, ikki at ganga umsóknmi njí: Fugloyar Kommunu á møti.

Av í, at umsókmn ikki er gingin á rnerti, verður .jorimununi, vísandi til § 8 í fyrisitingarlógini, givi, i møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð A manna- og heilsumálaráðsins.

Bi-5 ð verður um, at møguligar viðmerkmgar **i**?:u Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinai' ig **i**

**Hans Pauli Strøm**
landsstýn iim aður

/ Mana á Dul/
v irkandi aðalstjón

Hattarvík 30.05.2006

Almanna-og Heilsumálaráðið
Eirargarði 2
100 Tórshavn

í brævi frá Almanna- og Heilsumálaráðnum (dagfest 24.05.06/J.nr.: 0.35-200600078/2 - viðgjørt málið: RT/KA) til Fugloyar Kommunu verður sagt, at grein 18 í fyrisitingarlógini gevur møguleika "at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og Heilsumálaráðsins".

Tí fara vit at biðja um fund í Almanna- og Heilsumálaráðnum hesa vikuna (viku 22) ella í viku 24, har ið vit sleppa at greiða nærri frá fjølbýlinum í Fugloy.

Vinaliga,

vegna Fugloyar Kommunu (v/Zacharias Zachariasen)

G.g!

Svarið skal sendast til:
Marionnu Debes Dahl (skrivara í fjølbýlisbygginevnd Fugloyar Kommunu)
t-postur: fannir@post.olivant.fo

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

r

Fugloyar kommuna
**767** Hattarvík

*Stílaó Zachariasi Zakariasen, borgarstjóra*

L J

**Tórshavn, tann** 25. juli 2006

**J.Nr.:** 0.35-200600078/5
(al Ulskila í svari)

**Viðgjort: KA**

**Tygara skriv:**

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av eldrasambýli**

Almanna- og heilsumálaráðið hevur móttikið viðmerkingar frá Fugloyar kommunu í sambandi við, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum gjørdi av, ikki at ganga umsóknini um studningslán á møti.

Eftir at hava viðgjørt skrivið frá kommununi, er landstýrismaðunn komin til ta niðurstøðu, at einki nýtt fyriliggur í málinum, sum bendir á. at fyrrtikna avgerð er tikin út frá skeivum grundarlagi.

Sagt skai verða frá. at avgerð landsstýrismansins frá 24. mai 2006 um ikki at ganga umsókníni um studningslán frá Fugloyar kommunu á møti, stendur við.

Vinarliga

**Hans Paulí Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul /
virkandi aðalstjóri

# ALMANNA-OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Fugloyar kommuna
Stílað Zachariasi Zachariasen, borgarstjóra
767 Hattarvík

**Tórshavn, tann 11. september 2006**
**J.Nr.: 0.35-200600078/6**
**(at tilskila í svari)**

**Viðgjørt:** KA

**Tygara skriv:**

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av eldrasambýli**

Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivi dagfest 25. juli 2006 boðað kommununi, at avgerð landsstýrismansins um ikki at veita tilsøgn um studningslán stendur við, vísandi til, at kommunan er komin við svarskrivi til avgerð landsstýrismanssins frá 24. mai 2006.

Almanna- og heilsumálaráðið skal í hesum sambandi boða frá, at tíverri er ein feilur hendir í umsitingini, har tygara mál, er komið í bland við annað. Fugloyar kommuna hevur ikki sent svarskriv til Almanna- og heilsumálaráðið í hesum sambandi.

Skriv Almanna- og heilsumálaráðsins frá 25. juli 2006 til Fugloyar kommunu, verður við hesum tikið aftur, og verður Fugloyar kommunu givin ein freist til 9. oktober 2006, at koma við viðmerkingum til skriv Almanna- og heilsumálaráðsins frá 24. mai 2006.

Kommunan verður vinarliga biðin um at umbera mistakið.

Vinarliga

Kristjan Árnason
fulltrúi

Hattarvík 2.10.2006

Almanna-og heilsumálaráðið
Eirargarði 2
100 Tórshavn

Viðmerkingar til verkætlanina "Fjølbýlið í Fugloy" (J.nr.: 0.35-200600078/2 - viðgjørt málið RT/KÁ)

Verkætlanin "Fjølbýlið í Fugloy" bregður frá vanligum verkætlanum, tí fleiri ráð í landsumsitingini varða av henni. Sjálvandi ber illa til hjá lítlari, fámentari kommunu einsamallari at fara undir hesa nýskapandi verkætlan. Men hava vit syndarligu støðuna á útoyggjunum í huga, er tað vón okkara, at tey ymisku ráðini í landsumsitingini við góðu manning teirra og førleika fara at geva hesi verkætlan ans og í felag hjálpa kommununi at seta ætlanina í verk. Eydnast at fáa hetta fjølbýlið í Fugloy at virka, og fer tað at virka væl, vóna vit, at sama slag av fjølbýlum kann byggjast á hinum útoyggjunum allari tjóðini til frama - og ferðavinnu okkara.

Soleiðis hugsa vit okkum at verkætlanin skal fíggjast við láni og studningi ymsastaðni frá:

Parturin til eldrabýlið og barnaansingina: úr Almanna-og heilsumálaráðnum
Parturin til ferðafólkaplássini: úr Vinnumálaráðnum
Parturin til skúla/skeiðsvirksemi: úr Mentamálaráðnum

Harumframt mátti borið til at fingið stuðul úr eitt nú ferðavinnugrunni og frá Menningarstovuni.

011 hesi fíggingarmið eru jú sannir frumskógir at ferðast í hjá lítlari, fjarskotnari kommunu. Her er tað, vit vóna, at landsumsitingin og leiðslurnar í Menningarstovuni og Ferðaráði Føroya fara at sýna ætlanini áhuga og koma henni til hjálpar, so øll sláa manngarð um hesa verkætlan, sum óivað fer at vera av alstórum týdningi fyri útoyggjarnar. Ikki minni týdning kann tílík verkætlan koma at hava fyri ferðavinnuna í Føroyum - við tílíkum nútímans útoyggjadeplum hevði hon fíngið nógv fjølbroyttari ferðir at boðið útlendingum, sum vitja higar.

Almanna-og heilsumálaráðið fer í næstum at fáa innbjóðing til tíðindafund, har ið arkitektteknað skitsa av fjølbýlinum verður løgd fram. Tíðindafundurin og hetta skriv til tykkara t^/vónandi at fáa tykkum at taka umsókn Fugloyar kommunu aftur til viðgerðar.

Vinaliga,

vegna Fugloyar kommunu (v.Zacharias Zachariasen)

M.D.Dahl
bygginevndarskrivari

**Tíðindaskriv:**

# Fjølbýlið í Fugloy

Fjølbýli:

Stovnur, ið skal virka á fleiri økjum samstundis.
Smáar eindir savnaðar undir somu lon.

Eindirnar, ið eftir ætlan verða í fjølbýlinum í Fugloy:

Eldrarøkt
Barnaansing
Frálæra (vanligur skúli/skeiðsvirksemi)
Ferðavinna

Tekning av fjølbýlinum í Fugloy verður løgd fram á almennum tíðindafundi í:

Tilhaldinum í Tórsgøtu 21 í Havn

týsdagin hin 31 .oktober klokkan 15

**Á** fundinum verður greitt frá tekningini og hugskotinum.

Bygginevndin:

Zacharias Zachariasen,
Jóannis Christiansen,
Amalja í Frammistovu,
Marianna Debes Dahl.

4>S§£\ **ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Fjugloyar kommuna
v/Zakarias Zakariasen
767 Hattarvík

**Tórshavn, íann 4. desember 2006**

**J.Nr.: 0.35-200600078/8**
**(at tilskiia i svari)**

**Viðgjort:**

**Tygara skriv:**

**Viðvíkjandi umsókn um studningsián til bygging av eldrasambýli**

Vió skrivi dagfest 24. mai 2006 boðaði Alnianna- og heilsumálaráðið Fugloyar kommunu frá, at unisókn kommunurnar um studningslán til eldrasambýli ikki verður gingin á møti.

Sum grundgeving fyri hesi avgerð varð sagt, *at sambýlið er ein partur av eini størri verkætlan um ein sovnevndan oyggjadepil, ið ætlandi skal samskipa eldrarøkt, barnaansing, ferðavinnu og skeiðsvirksemi. Eingin tekningfyriHggur, ug í umsóknini verður onki sagí um, hvussu artlanin er dt figgja verkætlanina. Harumframt ber umsóknin brá av óvissu, hvat figgingini av kommuna-partinum í iløguni viðvíkur.*

Almanna- og heilsumálaráðið hevur givið kommununi høvi til at gera viðmerkingar til avgerð ráðsins.

Víðmerkíngar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsms er móttiknar 2. oktober 2006,

í hesum sambandi skal verða sagt frá, at einki nýtt fyriliggur í málinum, sum bendir á, at avgerðin og grundgevtngamar í fyrrtiknu avgerð, er tikin út frá skeivum grundarlagi.

Sagt skal verða frá, at avgerð landsstýrismansins frá 24. mai 2006 um ikki at ganga umsóknini um studningslán frá Fugloyar kommunu á møti, stendur við.

Landsstýrismaðurin vil leggja afturat, at um verkætlanin er ein partur av eini útoyggja menningarætlan, er rættast, um umsóknin verður send Innlendismálaráðum til viðgerðar.

**^yinarliga *i***

**Hans Fauii Strem**
landsstýrismaður

Poul Geert Hansen
aðalstjóri

Hattarvík 29.12.2006

Til: Almanna-og heilsumálaráðið
Eirargarði 2
100 Tórshavn

Fugloyar kommuna hevur frá Almanna-og heilsumálaráðnum fmgið bræv dagfest hin 4. desember 2006. Brævið er ógvuliga kubbaslig endurtøka av brævi frá 24. mai 2006.1 brævi frá Fugloyar kommunu til Almanna-og heilsumálaráðið, dagfest 30.05.2006, verður biðið um fund at greiða nærri frá fjølbýlinum. Einki svar.

í oktober 2006 varð Almanna-og heilsumálaráðið boðið við til tíðindafund, har ið arkitektteknað skitsa og modell av fjølbýlinum skuldu sýnast fram og nærri fór at verða greitt frá verkætlanini. Einki svar. Og eingin frá Almanna-og heilsumálaráðnum møtti upp á tíðindafundinum.

Tað er mark fyri, hvat ið eitt lítið bygdarráð á fjarskotnari oyggj kemur út fyri at avrika, og fyri, hvar ið krevjast kann av skrivligum frágreiðingum frá óløntum skrivara, sum bara arbeiðir av huga.

Tí var spell og óheppið, at eingin av væl løntu starvsfólkunum í Almanna-og heilsumálaráðnum gav sær stundir at koma á tíðindafundin at lýða á, hvørjar ætlanirnar vóru við fjølbýlinum, ið jú m.a. skal fevna um eldrarøkt. At fylgt við tílíkum máli mátti verið náttúrligur partur av arbeiðinum hjá teimum, ið starvast í Almanna-og heilsumálaráðnum.

At senda ákærandi brøv tænir ongum endamáli. Tónin í brævinum frá 4. desember 2006 er nevniliga *ákærandi* í staðin fyri at vera positivur. Eitt nú kundu brævskrivararnir boðið tí lítlu fjølbýlisbygginevndini hjálp og stuðul. Teir, sum skriva brævið, tykjast vera í verjustøðu.

Eingin hevur ákært nakran. Fugloyar kommuna hevur bara loyvt sær at venda sær til tann partin av almennu umsitingini, sum hon heldur kann koma sær til hjálpar.

Viðvíkjandi seinasta reglubrotinum kunnu vit nevna, at Innlendismálaráðið stuðlaði arkitekt-tekningini við 2/3 av kostnaðinum, og Fugloyar kommuna sjálv rindaði 1/3 av kostnaðinum. Innlendismálaráðið sendi eisini umboð á tíðindafundin, og tað gleddi okkum, sum varða av verkætlanini.

Vón okkara var at fáa politikarar og fulltrúar á tal, tá ið vit høvdu tekning og modell at tosa útfrá. Men enn gongur striltið.

Við vón um betri samstarv framyvir.

Fugloyar kommuna

v/Zacharis Zachariassen

Til: Innlendismálaráðið 08.03.2007

Postsmoga 159

110 Tórshavn

Av játtanini til útoyggjamenning verður hervið søkt um stuðul til verkætlanina „Fjølbýlið í Fugloy" (sí viðlagda faldara)

a. Endamálið við ætlanini: Ein roynd at ganga nýggjar leiðir og hugsa øðrvísi enn gjørt hevur verið higartil, tá ið tað kemur til spurningin um trivnað á teimum smáu plássunum.
b. Útgreinað lýsing av, hvussu verkætlanin verður framd: Fyrsta treytin fyri, at verkætlanin sleppur at standa sína royndm er, at fígging fæst til at byggja henda óvanliga stovn, sum fyribils fevnir um fýra „vanligar" stovnar: eldrarøkt, barnaansing, skúla/skeiðsvirksemi og ferðavinnu. Eru karmarnir komnir, verður virksemið fíggjað ymsastaðn^rá, eitt nú fíggjar Almanna-og Heilsumálaráðið 100% av eldrarøktini, eru plássini til tey gomlu tøk.
c. Leiðari av ætlanini: Tað er Fugloyar kommuna - við hesum kommunustýrislimum: Zacharias Zachariassen, Amalja í Frammistovu og Jóannes Christiansen - sum saman við sjálvbodna, ólønta skrivaranum Marionnu Debes Dahl roynir at stríðast fyri verkætlanini. Verður fjølbýlið veruleiki, skal leiðari setast eftir galdandi reglum.
d. Kostnaður av ætlanini: Mett verður, at fjølbýlið fer at kosta kr. 12.000.000,-
e. Fíggjarætlan, herundir útreiðslur, inntøkur, eginfígging og onnur fígging: Eginfígging: Fugloyar kommuna ætlar at stuðla við kr. 2.000.000,- (sum er helvtin av ogn kommunujar). Onnur fígging: Tvær umsóknir um stuðul eru nústani sendar - ein til MaHrsk McKinney Møller-fyritøkuna og ein til norðurlendska stuðulsgrunnin NORA.
f. Um verkætlanin varar fleiri árjskal upplýsast, hvussu stóran stuðul ætlanin er at søkja um av játtanini til útoyggjamenning komandi árini: Illa ber til at siga, um ætlanin er at søkja um stuðul av játtanini til útoyggjamenning komandi árini. Tað veldst um, hvussu fer at gangast við verkætlanini.
g. Hvussu og nær verður frágreiðing um úrslitið av verkætlanini latið Innlendismálaráðnum: Fyrsta frágreiðingin um úrslit varð latin Innlendismálaráðnum á tíðindafundi í Havn hin 31 .oktober 2006. Tá var arkitektteknaða skitsan, sum Innlendismálaráðið hevði stuðlað við 2/3 (Fugloyar kommuna við 1/3), løgd fram. Verður stuðul latin til sjálva verkætlanina, er einki til hindurs fyri, at Innlendismálaráðið á hvørjum ári fær frágreiðing um úrslitið av verkætlanini ella um gongdina.

Við vón um vælvild,

vegna fjølbýlisbygginevndina

Marianna Debes Dahl, skrivari
767 Hattarvík
t-postur: ia.niiir@post.olivant.fo
tlf/fax: 45115$"

Hattarvík 3.5.07

Góða Elin.

Takk fyri seinast! Enn einaferð til lukku við nýggja starvinum. Sum eg skilji, so er tað menning og ferðamannavinna, sum verða tvinnað saman í tí starvi, sum tú nú hevur høvuðsábyrgdina av. Tí komi eg við hesum tilfari... Uttan iva er nógv hjá tær at fáast við. Vónandi fært tú kortini onkuntíð stundir til at fara ígjøgnum hetta 'keldutilfar', sum er ein leyslig samanseting av gongdini í einum av teimum smáu útjaðaraverkætlanunum (útoyggjalívbjarging) her á landi.

Sum tú kanst hugsa tær, er skjótt at køva hesar smáu verkætlanir í tí stóru, tungu umsitingini. Fáa tær góða móttøku, stuðul og eggjan frá teimum røttu fólkunum (í teimum røttu størvunum), er einki at ivast í, at tær kunnu mennast til stórar verkætlanir, sum fara at kasta nógv av sær, meiri, erm vit kanska beint nú duga at meta um.

í brævinum til tín liggur, sum nevnt, tilfar um gongdina í einum av hesum (sáru) málum. Endaliga heitið á verkætlanini varð: "Fjølbýlið í Fugloy" - í teimum fyrru brøvunum eru ymisk onnur heiti nýtt. Brævaskiftið er frá 2005 og fram til várið 2007. í grundini er tað hjartaskerandi í einum sovorðnum brævaskifti at síggja, hvussu embætisfólk í væl løntum størvum og politikararnir, tey arbeiða fyri, fara við vanligum (óløntum) fólki, sum ikki hava teirra førleika, eiheldur tíð ella orku at gera stórvegis við málið, serliga tá ið tey ferð eftir ferð rena seg í hesa massivu mótstøðu. Ein skuldi trúð, at hesi ymisku 'málaráðini' áttu at kent tað sum eina skyldu at sýnt øllum 'útoyggjalívbjargingarroyndum' áhuga, og at landsumsitingin skuldi gingið á odda, tá ið vegleiðing og ráð skulu veitast. Men so er ikki, so langt burturfrá.

Vónandi geva hesar 10 viðløgdu síðurnar tær eina mynd av gongdini í málinum og hylling á, hvussu tungt tað er at fáast við umsitingina. Lesur tú alt tilfarið, átti tú eisini at fmgið eina greiðari mynd av, hvørjar ætlanir liggja aftan fyri tankan um "Fjølbýlið í Fugloy".

Heldur tú, at tú ella onkur av starvsfólkum tínum á tí nýggja stovninum fáa rætt tiltakinum eina hjálpandi hond?

Blíðar heilsanir,

Marianna Debes Dahl (skrivari í bygginevndini)
767 Hattarvík

t-postur: fannir@post.olivant.fo
tlf: 451158

**INNLENDISMÁLARÁÐIÐ**

Marianna Debes Dahl
767 Hattarvik

19. juni 2007
Mál: 1700-037/07-2
Tygara skriv:
Viðgjørt: HIH

**Viðvíkjandi umsókn um stuðul til "Fjølbýlið í Fugloy"**

Tann 8. mars 2007 hevur Innlendismálaráðið fmgið umsókn tykkara um stuðul í sambandi við framhald av verkætlan um "Fjølbýlið í Fugloy" áður kallað "Marg-hús" í Fugloy.

Innlendismálaráðið játtaði í fjørð 40.000,- kr. til verkætlanina tí at mett varð at verkætlanin var stak áhugaverd og at eitt tílíkt hús kundi gerast eitt stórt virði fyri Fugloynna, og hugskotið møguliga kundi endurnýtast á øðrum útoyggjum.

Av teimum 12 mió. kr., sum húsið er mett at kosta, er bert fígging játtað frá Fugloyar kommunu á 2 mió. kr. harumframt hevur Almanna- og heilsumálaráðið mett at parturin av ætlanini, ið er ætlaður teimum eldru, ikki hóskar saman við restini av verkædanini. Vísandi til hetta metir Innlendismálaráðið at ætlanin í løtuni er ivasom og hevur Innlendismálaráðið tí gjørt av, ikki at veita stuðul til hesa verkætlan í ár.

Eru ivaspurningar, eru tygum vælkomin at ringja.

Vegna Innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Postboks 159 • 110Tórshavn • Tlf 358080' faks 358085- imr@imr.fo • www.imr.fo